


# Nýhugsandi Menningarleiðari til Eik-samtakið

Vit sóknast eftir leiðara til menningardeild okkara, ið virkar innan alt Eik-samtakið.

**Avbjóðingin**
Vøksturin í Eik-samtakinum seinastu árini setir fyritøkuni stór krøv, ikki minst Menningardeildini, ið fremur verkætlanir í og uttan fyri Føroyar. Menningarleiðarin hevur ábyrgdina av prosess- og produktmenning í Eik Banka, herundir dokumentatión og automatisering.

Harumframt, mennir og røkir Menningardeildin tøkniliga samskiftið, virkisgongdir og tænastur í tøttum samstarvi við stáps- og rakstrardeildir í Eik Banka. Deildin skal liva upp til aðalvirðini í Eik at vera professionell, innlivandi og nýhugsandi.

Fyri at Menningardeildin kann stuðla uppundir at samtakið altíð er kappingarført, krevst ein góður og sjálvstøðugur menningarleiðari við hóskandi útbúgving og royndum til forrætningsmenning, har KT verður brúkt sum amboð.

Menningarleiðarin er partur av einari altjóðagjørdari og slóðbrótandi fyritøku. Uppgávurnar hjá menningarleiðaranum eru at hava dagligu deildarleiðsluna og at skipa arbeiðið soleiðis, at Eik-samtakið hevur eina kappingarføra prosess, tá ið bankin veitir kundum sínum fíggjartænastur. Trivnaður, arbeiðsgleði og toymisandi hjá starvsfólkunum hevur avgerandi týdning fyri Eik, og á hesum økjum skal menningarleiðarin vera virkin.

**Fakligir eginleikar**
- Tú hevur viðkomandi útbúgving, Cand. Merc., Cand. Merc. Dat. ella líknandi
- Tú hevur projekt- og leiðsluroyndir
- Royndir frá peningastovni eru ein fyrimunur

**Persónligir eginleikar**
- Tú hevur góð samstarvsevni
- Tú dugir væl at samskifta og virka í einum umhvørvi í støðugari broyting og menning
- Tú eggjar øðrum til og torir at ganga á odda
- Tú hevur lætt við at taka avgerðir, og vegurin frá hugskoti til veruleika er stuttur

**Vit bjóða**
Eitt avbjóðandi starv við beinleiðis tilvísing til stjórn, og við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Starvið verður sett sum skjótast og verður lønt sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel 348510, teldupostur marjun.eystberg@eik.fo ella til Marner Jacobsen, forstjóra, teldupostur marner.jacobsen@eik.fo. Umsóknir skulu verða Eik Banka í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 25. mars 2008. Tær skulu stílast til:

**Eik Banki**
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Í Eik-samtakinum starvast á leið 400 fólk á 16 deildum kring landið, í dótturfelagnum Inni og í dótturfelagnum Eik Bank Danmark A/S. Á Menningardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 9 fólk.

www.eik.fo



# KT fólk til Skipasmiðjuna

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi, við stórum fjølbroytni, í eini tí stórstu fyritøkuni í Føroyum?

Vit leita eftir einum KT-fólki sum hevur breiðan kunnleika til teldutøkni. Arbeiðið fevnir um alt vanligt viðlíkahald av teldum, netverkið og hjálp til okkara uml. 100 KT brúkarar, umframt at vera við til at leggja okkara framtíðarætlanir innan KT økið á deildum okkara í Tórshavn, á Skála, í Runavík og í Vestmanna.

Vit roknað við at tú ert røkin, álítandi, ikki bangin fyri at taka ímóti avbjóðingum og hevur lætt við at tosa við fólk.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum, CV o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att: Tummas Nielsen

Umsóknarfreistin er 14. apríl 2008

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jens Hansen, KT- og trygdarleiðara á telefon 79 11 34 ella Tummas Nielsen, fíggjarleiðara á telefon 79 11 22

- ein depil innan skipatænastur

SKIPASMIÐJAN

# Ársfundur

Árligi ársfundurin fyri limirnar í handlum FK´s í Hoyvík og Tórshavn verður í matarstovuni hjá Føroya Keypssamtøku í Hoyvík
**27. Mars 2008 kl. 19.30.**

Skráin verður sambært lógum felagsins.

Allir limir er vælkomnir at møta.

**Limanevndin**